# Íslandssáttmálin, dagføring av handilsrákum

BOGI ELIASEN
cand.scient.pol



Stjórin á Menningarstovuna hevur púra rætt, tá hann sigur at Íslandssáttmalin skal dagføra okkum.

Vinnuligi áhugin fyri hvørjum øðrum í bæði Íslandi og Føroyum er vaktur, og nú verður bíðað eftir at sáttmálin landana millum kemur uppá pláss.

Eitt er at hesin sáttmálin gevur føroyskum fyritøkum øktar møguleikar, tí Ísland eisini gerst okkara heimamarknaður, men annað er, at hetta er ein sáttmáli sum lýkur tær treytir sum fríhandilssáttmálar hava, og tí eisini setir hesi krøv til bæði tað almenna og privatu Føroyar.

Serliga aftaná kalda kríggið hevur verið ein støðug tilgongd ímóti eini liberalisering av handli millum lond, ikki minst staðfest í stovnanini av WTO. Tað kann sigast at hetta komst m.a. av at kapitalisman og frælsið vann á kommunismuni, men eisini at stríðandi blokkar ikki longur forðaðu fyri alheims samstarvi. Nýbrotið rakti so samstundis í eini tíð, har tøknin gjørdi samstarv nógv lættari.

## Virðir

Men júst virðini eru komin á breddan aftur. Nógv stríð er og hevur verið um at fáa heimshandilin at virka undir frælsari karmum. Og eisini verður av nógvum mett, at tær forðingar sum í dag eru, eru við til at halda vanbýtinum sum er av heimsins ríkidømi. M.a. tí hava nógv av ríkaru londunum ikki verið so fegin um at liberalisera allar reglar, og ikki minst hevur Frakland bart út ført fram, at landið gongur inn fyri fríhandli millim lond í handilsblokkum, tvs. fyri Frakland við londini í ES og ikki við onnur lond. Franska ásjónin er, at ein felagsskapur sum ES onga meining hevur, um fríhamdil skal verða millum øll heimsins lond.

## ES og??

Tí hava fleiri víst á, at WTO samráðingarnar í hesum árum eru altavgerðandi fyri um framtíðin er ein liberalisraður heimsbúskapur ella fleiri handilsblokkar, sum eru hvør sítt búskaparøki. Talan er tí í dag aftur um virðisstríð, tí antin er talan um at arbeiða fram ímóti einum heimi við alheims handilsfrælsi, ella at skipa seg í blokkar og ansa eftir sær. Stríðið er trupult, tí stjórnarleiðarar mugu hugsa um at vinna tjóð síni best møguligu støðuna, eins og alheimsgerðin viðførir, at trupuleikar aðrar staðir kunnu fáa ávirkan á teg. M.a. flóttafólkastreymar, yvirgangur og kríggj, sum aftur hevur ávirkan á einstaka landið og felags menniskjalig virðir.

## EFTA

EFTA er eitt av handilssamstørvinum. EFTA londini





*Fransmaðurin Pascal Lamy er stjóri í WTO og berjist fyri fríhandli, meðan franska stjórnin hevur sett spurnaðatekin við um tað er rætti leisturin.*

kunnu sigast at vera lond sum ynskja búskaparligt samstarv, men ikki alla tað politisku samansjóðingina, sum ES stendur fyri. Tvs. at virðið hesum viðvíkjandi er umfatandi búskaparligt samstarv, uttan at leggja tyngd í tað poltiska samstarvið.

## Ríkisfelagsskapurin (samband/loysing)

Heima hjá okkum verður ES spurningar ofta tikin fram, men sjálvdan sum annað enn frælsa marknaðaratgongd til ES marknaðin. Fyri at loysa spurningin er neyðugt eisini at síggja hann sum ein virðisspurning. Taka vit undir við ES virðunum, taka vit undir við miðsavnanini og serliga taka vit undir við ES fiskivinnupolitikkinum. Okkara virðir eru altavgerandi fyri støðutakan, og áttu eisini at verðið grundleggjandi fyri, hvussu vit ynskja okkara samband við Danmark. Ynskið um yvirtøku av málsøkjum má neyðturviliga eisini merkja, at vit hava onnur virðir og ynskja málsøkið stýrt øðrvísi.

## Heimastýrislógin, Uttanríkispolitiska heimildin og Íslandssáttmálin

Íslandssáttmálin er ein fríhandilssáttmáli og samansjóðar Føroyar og Ísland sum eitt búskaparøki. So ið hvussu so er í mun til Ísland, um hann verður settur verk, so er talan um búskaparlig liberal virðir. Men spurningurin er eisini um júst hvussu hesin sáttmálin er komin, og har er vorðið heldur ørkymlandi um nær vit eru í Heimastýrislóg og nær vit eru í Heimildarlóg. Soleiðis hava vit nú avgjørt, at okkara viðurskiftir úteftir skulu verða, nú í hvussu so er. Men støðan er eisini fløkt av virðisloysi og tørvandi máttmegi ella vilja til at vísa á egin virðir, og soleiðis samansjóðað fáa tað sum vit ynskja.

## Heimliga

Alheimsgerðin er tí í stóran mun eisini ein spurningur um virðir. Á handilsøkinum eru skilmark-ingarnar fríhandil ella ikki, og kanska um hann skal verða økisavmarkaður ella alheims. Føroyar eru so lítlar, at vit kunnu ikki annað enn vinna nógv meira við fríhandli. Men vit verða noydd til at finna okkara virðir. Alheimsgerðin er ikki at hyggja og kopiera. Alheimsgerðin er at verða tilvitaður um egin virðir, egna styrki og egnar veikleikar, og so eisini at taka til sín, tað sum er brúkbart.

## At vita fyri at verða

Frá egnum virðum ber síðani til at gagnnýta teir møguleikar, sum eru altjóða, og eisini at læra av øðrum. Íslandssáttmálin setir okkum stór krøv. Vit lata okkum upp fyri einum øðrum landi, skulu laga okkara skipan til tey krøv, ein dagførdur handilssáttmáli krevur, og tí eisini broyta tey viðurskiftir, sum tað krevur. Ágóðin er, at vit verða klár til aðrar sáttmálar, men eisini at vit nú tvungin mugu taka støðu, um vit taka undir við teimum broytingum sum fríhandilssáttmálar krevja. Tí setur tilgongdin virðirspurningin á breddan, og politiski dómadagurin er tá Løgtingið skal viga hann.

Vit fáa tí knívin á barkan um vit ynskja er verða partur av liberala handilspartinum í alheimsgerðini, ella vit vilja hava onnur virðir. Her hevði eisini verið ynskiligt at sæð virðini í einum langtíðarsjónarmiði, bæði hjá vinnuni og einstøkun vinnulívsfólki, soleiðis at hesar tilgongdir ikki bert verða tengdar at núverandi handilsmøguleikum og politiskum uppmerksemi.




*Nógv eru virðini, og støða skal takast*